# N HÓAST



*Teir báðir ungu litavarnir, 23 ára gamli Andrey Fedosiuk og 24 ára gamli Genrik Karuzel vóru ikki sjónliga ávirkaðir av at hava sitið í varðhaldi so leingi.*

rættinum, men dómarnir eru ikki feldir enn. Fleiri fólk í Litava eru somuleiðis undir illgruna, men fútin Karen Marie Olesen, sum er ákæri í hesum málinum, upplýsti í rættinum mánadagin, at politiið í Litava er trekt við at koma við upplýsingum um hesi fólk.

Teir báðir ákærdu eru vinmenn.

Mánadagin varð Andrej Fedosiuk avhoyrdur, og týsdagin átti Genrik Karuzel tørn at avhoyrast.

## Siga lítið

Ikki er tað nógv, sum teir ákærdu hava upplýst í rættinum, og eingin spurningur varð settur til funnu rúsevnini í bilinum.

Andrej Fedosjuk segði, at upprunaliga ætlanin var, at hann og ein annar maður skuldu fara til Íslands at arbeiða í byggivinnuni. Ein litaviskur vinmaður teirra har hevði sagt, at hann skuldi útvega teimum arbeiði. So kom Genrik Karuzel uppí, og hin maðurin settist aftur.

Hin maðurin átti bilin. Teir báðir ákærdu sóu einki løgið í, at hann setti bil til, tí tað lá í luftini, at tann maðurin skuldi koma til Íslands seinni at arbeiða.

6. mai fóru teir úr Litava, koyrdu gjøgnum Polland og Týskland og til Esbjerg í Danmark.

Andrej Fedosjuk rindaði allar útreiðslurnar, tí hin átti ongan pening. Hin maðurin skuldi gjalda helvtina, tá ið henn hevði vunnið nakað í Íslandi.

## Kendu einki til Ísland

Teir hildu heldur einki løgið vera í, at teir fóru til Íslands at arbeiða, sjálvt um Ísland tá var komið í svára fíggjarkreppu. Kreppan var stór í Litava, og teir vildu burtur fyri at vinna nakrar krónur. At tað stóð so illa til í Íslandi, vistu teir einki um, tí teir fylgdu ongantíð við tíðindum.

Við sær høvdu teir umframt klæðir og tílíkt handverkaraamboð og eitt tjald. Tjaldið høvdu teir við, tí báðir søgdu seg hava stóran alsk til náttúruna.

Tá ið teir komu til Esbjerg, fingu teir ikki fartelefonir sínar at rigga. Langt um leingi fingu teir keypt sær eitt talutíðarkort, og ein kvinna á posthúsinum hjálpti teimum við at aktivera tað. Eina aðrastaðni fingu teir hjálp til at fylla á kortið.

Navnið á Genrik Karuzel stóð ikki á ferðaseðlinum, sum teir høvdu, men tað var eingin forðing fyri at sleppa umborð á Norrönu. Pass høvdu teir báðir.

## Væl krógvað

Mánadagin legði ákærin fram myndir, sum vístu, hvussu snildisliga rúsevnini vóru krógvað í akkumulatorinum. Stengur vórðu tiknar úr akkumulatorinum fyri at geva pláss fyri rúsevnunum. Fyri at kunna seta bilin í gongd var eitt minni battarí sett í bilin har frammi.

Illgrunin fall á akkumolatorin, tí hann var so lættur.

Báðir menninir eru uppvaksnir í eini bygd uttan fyri høvuðsstaðin, og teir hava kenst síðan skúlaárini. Annar gekk tey 12 árini í fólkaskúla. Hin tók eina tvey ára snikkaraútbúgving aftrat. Annar býr hjá foreldunum báðum, hin hjá mammu síni.

Inntøkan hjá báðum hevur verið eitt sindur upp og niður, og annar viðgekk, at hann eisini hevði arbeitt svart.

Hvørgin av teimum ákærdu sóu nakrar trupulleikar í, at teir ikki fóru at klára seg málsliga í Íslandi. Annars tosar litaviskt, russiskt og polskt. Hin tosar haraftrat eitt sindur av enskum.

## Søgdu ikki alt heima

Báðir teir ákærdu menninir eru trúlovaðir. Gentur teirra hava greitt politinum frá, at tær høvdu fingið upplýst, at vinmenn teirra ætlaðu at vera burturi í tvær vikur. Annar hevði sagt, at hann fór til Íslands, hin at hann fór til Pollands.

Mánadagin var Andrej Fedosiuk tráspurdur um tær tríggjar telefonirnar, sum hann hevði, og um telefonkortini. Hvønn hann hevði ringt til, og hvør hevði ringt til hansara. Maðurin mintist ikki kotuna, men politiið hevði frá rættinum fingið loyvi at fara í telefonirnar.

Menninir eru fleiri ferðir avhoyrdir av politinum, meðan teir hava sitið í varðhaldinum í Havn.

## Avlurtaðir í geglinum

Eina ferð fann politiið útav, at hóast teir sótu avbyrgdir, høvdu teir samband hvør við annan.

Tað byrjaði, eftir at annar varð avoyrdur, óður kom aftur í klivan og langaði í veggin. Hetta hoyrdi hin, og teir funnu útav, hvussu nær hvør øðrum teir sótu.

Tá tók politiið tað óvanliga stigið at biðja rættin um loyvi til avlurting uttanfyri, tí politiið helt seg vita, at teir tosaðu saman við at lata vindeyguni á glopp.

Nakrar av teimum avlurtingunum vórðu spældar av í rættinum mánadagin, og tá kundu teir báðir ikki lata vera við at flenna. Ikki minst tí, at teir á upptøkunum bannaðu og blótaðu.

Menninir eru í rættinum oystir undir í spurningum,og manga ferðina svara teir, at teir minnast ikki. Av fólkunum, teir verða spurdir um, kenna teir tey fægstu.

Málið koyrir víðari í rættinum væntandi heilt il fríggjadagin í næstu viku. Onkran frídag fáa vitnini tó ímillum.